TAKS




# Vit ynskja okkum tveir virkisfýsnar lærlingar

## Dámar tær at hjálpa og vegleiða fólki? Hevur tú áhuga í kundatænastu? Hvussu við innflutningsgjøldum, upprunareglum og tolli, ljóðar tað áhugavert?

Frá 1. september bjóða vit tveimum ágrýtnum fólkum at byrja í læru á TAKS. Annað læruplássið er knýtt at Kundatænastuni og hitt at Tollinum.

Sum lærlingur á TAKS fært tú fjølbroyttar royndir innan skrivstovuyrkið á fleiri ymiskum deildum, men tú fært serligan kunnleika til tað arbeiðsøkið, har tú hevur títt tilknýtið.

Á TAKS umsita vit lógir. Arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar, men allar krevja, at tú arbeiðir samvitskufult og við nærlagni.

Vit samskifta við nógv og ymisk fólk, so tú mást vera áhugað/ur í tænastu og í at samskifta væl. Tí er eisini gott, um tú hevur góðan málkunnleika, serliga til føroyskt og í ávísan mun til enskt og danskt. Samstundis mást tú kenna teg væl til rættis við telduna, tí alt arbeiðið á TAKS er knýtt at teldum.

Vit vilja helst, at tú hevur eina miðnámsútbúgving, men krevja tað ikki. Lærutíðin er treytað av tínari útbúgving frammanundan:

- 4 ár við fólkaskúlaprógvi
- 3 ár við FHS-prógvi
- 2½ ár við students- HF ella HTX-prógvi
- 2 ár við HH- prógvi

Læruplássini eru í Tórshavn, men onkur tíðarskeið fert tú helst at starvast aðra staðni í landinum. Í lærutíðini fer tú í skúla í Danmark at taka ástøðiliga partin av útbúgvingini.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Vilt tú vita meira um læruplássini, kanst tú venda tær til:

Dianu Gilstón, leiðara í Kundatænastuni, tel. 352750 ella dg@taks.fo
Jens Christian Olsen, leiðara í Tollinum, tel. 352782 ella jco@taks.fo

Umsókn, prógv, CV og viðmæli skulu sendast til taks@taks.fo merkt Næmingur til Kundatænastu ella Næmingur til Tollin.

Freistin at søkja er fríggjadagin 4. juli 2014 kl. 12.

www.taks.fo